# Jólaheilsanir av Portalinum

**Niðanfyri prenta vit nakrar av jólaheilsanu8num, sum føroyingar uttanlands sendu portalinum á jólum**

nýggjár. Her er vànaligt veður,so vit liggja inni ì einum fjørði har vit skulu halda jòl. Heilsan Mortan, Carl ,Helgi, Bjarni og Jonbert :)

---



**Katharina**

Eg eiti Katharina og búgvi í Læsten, beint uttan fyri Randers, saman við mammu og babba

Eg fari at halda jól hjá Ommu, sum býr í Hokksund í Norra. Her er sera gott veður. Tað er kavi og kalt og sólin skínur, so tað er sera jólaligt. Jólaaftan skulu vit eta lambasteik til døgurða og alt sum har til hoyrir. Omaná skulu vit eisini hava risalamande, sum Omma hevur gjørt. Eg vil gjarna senda eina jólaheilsu heim til familjuna í Føroyum. Eisini vil eg senda eina heilsu til Óluvu í Homrun, tað var sera stuttligt at hava teg á vitjan í summar, vónandi síggjast vit skjótt aftur. Eg vil eisini senda eina heilsu til Anju-mostur og hennara familju, Randi-mostur við familju, og Abba, sum í ár, heldur jól hjá Randi-mostur. Heilsan frá øllum. Katharina

---

**Sólfríð Skarðhamar**
**Heilsan úr Fredericia**

Hey hey :) Vit í Fredericia vilja gjarna ynskja allari familju okkara, vinum og kenningum eini gleðilig jól og eitt av Harranum vælsignað nýggjár. Og ein serliga heilsan til mammu, Katrin. Vit sakna teg sera nógv. Vit gleða okkum at síggja tykkum øll aftur, vónandi verður tað heilt skjótt. Og ein lítil heilsan til Hósvíkar, Birgit og Eyðun v/fam. Vit sakna eisini tykkum sera nógv. Vit eru farin til Herborg at halda jól saman við familjuni. Vit fáa gás og fleskasteik at eta jólaaftan og nógvar gávur at opna. Børnini fara hvønn dag út í garasjuna og vita um jólamaðurin hevur verið og lagt teimum gávur, og tað hevur hann verið hvørt kvøld og teimum dáma sera væl :) Gleðilig jól øll somul Heilsan Sólfríð v/fam í Fredericia

---

**Kim Antonisen**
**Heilsan úr Esbjerg**

Vi ønsker alle oppe på Færøerne og de i Danmark som vi kender en glædelig jul og et godt nytår Vi holder jul sammen med familien i Herslev Kærlig Hilsner Kim, Donna, Rògvi, William og Peder fra Esbjerg

---

**Hey frá Seydisfjørðinum**
**Jólaheilsan**

Vit vilja ynskja øllum har heima eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýttár. Jólini vera hildin heima hjá okkum og okur fáa vitjan frá íslensku fjølskyldunni. Her er alt hvít og vantandi er, at meira kavi kemur. Deiligt. Tann 14.11.07 fekk Júlíana Rós ein lítlabeiggja og barnadóp verður Tann 26.12.07 Hann skal eita "Jens Heri" Kærar heilsanirfrá Jens Heri, Júlíana Rós, Ása Bjørg og Atli

---

**Mina, Heidi og Jonhild**
**Jólaheilsan**

Hendan heilsan fer fyrst til Oyndarfjørd. Góði Adolf, Beatrice, Zeus og Karsten og Skopunar. Góða Alis, Daniel, Noah og Nicklas og til Fuglafjørd: Maria og Elibert við familju. Til Havnar: Jórun og Jan við familju. Skála: Marjun við familju, og so inn á Kambsdal til tín góða Julianna við familju. Og Klaksvíkar: Ólavur við familju og uppi á Hædd til tín Jens Christian. So til alla okkara ætt og vinir og kenningar runt um í landinum. Tykkum ynskist øll eini gleðilig jól og gott nýggjár. Takk fyri árið, sum skjótt er at enda. Eg skal halda jól saman við Heidi, Jonhild, Joan, Mikael og John. Vit fáa fleskesteik og dunnu jólaaftan og so dansa um jólatræið, so pakkar og rísalamanda. Nýggjársaftan vera vit heima hjá mær. Tær kærastu heilsanirfrá Mina, Heidi og Jonhild

---

**Gurli Joensen**
**Zosia, Gurli og Runi Joensen**

Vi ønsker alle en dejlig fredfyldt jul og et velsignet nytår! Vi sender en særlig hilsen til familien Joensen i Streymnes, som vi savner meget - specielt vores Mamma, som har ventet længe på denne hilsen ;- ) Kærlig hilsen Zosia, Gurli og Runi Joensen

---

**Familjan Bertholdsen í Ranum Diana, Niels, Dánial, Olivia og Petur Martin**

Hey hey tit øll har heima. Nú er tíðin so komin til at vit skulu halda jól í Danmark. Vit gleda okkum nógv, men tad er sjálvandi eitt sindur trist, at vera so longt vekk frá restini av familiuni, sum man plagar at vera saman vid á jólum. Vit vilja fegin senda eina heilsan til øll har heima, til foreldur okkara, Annu og Dánial á Gardsenda og Katrin og Martin á Rættargøtu, abba á Gardsenda, Elsa omma, Elisu mostur v/fam, Karin Mostur v/fam, Sørin v/fam, Hans Arna v/fam, Mostur v/fam, mammubeiggjar v/fam, fastrar v/fam, Freddy v/fam, til allar mínar vinkonur, eg havi hoyrt, at tit ætla at eta ræst kjøt saman, hevdi veri stuttligt at veri vid, men tad má bída til eina adru ferd. Eisini ein heilsan til nabygvarnar uppi undir klakki, senda vit eina heilsu. Olivia vil senda eina serliga heilsan til Rósu v/fam. Annars ætt vinir og kenningar senda vit einar blídar heilsanirum eini Gledilig Jól og Harrans signing í komandi ári. Jólaaftan hjá okkum byrjar vid at vit hava bjóda Astu, Gimma og børnunum til frokost, so fara vit í Kirkju, umlei kl.18. Fara vit so at eta dunnu vid øllum tilbehoyr, so pakka gávur upp, og vit enda sálvandi vid rísalamande, so jólaaftan verdur sum tad plagar. Til sídst vil eg senda eina heilsu til føroyingarnir í Ranum, sum eru farnir heim at halda jól, Jensu v/fam, og Simonu og Jóannes v/fam. Gleda okkum til tit koma heim aftur. Bestu ynskir Diana, Niels, Dánial, Olivia og Petur Martin Bertholdsen

---

**Sandra Joensen**
**En julehilsen fra Sandra og Trine og alle de andre**

Vi vil ønske mor far Kim Nine Olivar Paule Moster Onkel Edvard og mosters allerbedste skat Poul moster savner dig og glæder mig til at vi ses igen ,glædelig jul og godt nytår .hele min familje på Toftir alle mine venner glædelig jul godt nytår .Vi er så mange så i får kun et billede af Trine Savner jer alle sammen Skulle hilse fra Kent, Kasper, Magnus, Martin og Gunn

---

**Frá Løvhøjten**
**Heilsan úr Modeby, Pandrup, Norðurjylland í Danmark**

Vit ynskja øllum, familju, vinum, kenningum og landsmonnum eini gleðilig jól og eitt av Harranum vælsignað nýggjár. Vit eru øll samlaði hjá Stanley jólaaftan, so tað verður hugnaligt. Vónandi hava tit øll tað líka hugnaligt Alt tað besta ynskja vit tykkum Familjan Løvhøjten

---

**Jónsvein Berg, Mærsk Explorer**

Øllum har heima, ætt vinum og kenningum, vil eg ynskja eini gledilig jól, og eitt gott nýggjár.

Ein serlig heisan ferd til Glyvrar og Skopunar, Til Hannu, Magnus og Dávid á Glyvrum. Mammu, Pápa og systir í Skopun. Vit halda jól í Kaspiska havinum, í russiskum øki, har vit eru um, at byrja at bora eftur olju og gassi. Vit hava multi etniskt mannskap umbord, so eg veit ikki hvat teir indisku kokkarnir bjóda til jóla. Heilsan Jónsvein Berg Mærsk Explorer

---

**Janni & Robert**

Vit bæðið vilja ynskjafamilju, vinum og kenningum heima í Føroyum einihugnarlig jól, og Harrans signing í tí nýggjaárinum.
Ein serlig heilsan fer heim til Eiðis tilmammu, babba, Sóleyð, Paulu (við monnum) og lítlabeiggja Benjamin :). Tað verður løgið ikki, atverða saman við tykkum á jólum. Vit verðaher í Hårlev, og halda jól í ársaman við foreldrunum hjá Roberti, sum eru komin úrTýsklandi í øllum góðum. Tey lætatykkum øllum eisini tær allar bestu heilsanir. Áborðinum jólaaftan fara vit at hava dunnu við øllumtí góða, ið har hoyrur til, og omanáfara vit at hava Rís á la mande við mandlu í:). Vit sakan tykkum øll, og gleða okkum til at síggjatykkum aftur í summar :) Bestu heilsanir Janni &Robert

---

**Frá Amandu**

Til vinir, kenningar og familju, eg vóni at tit øll fáa eini góð og hugnalig jól og at nýggja árið fer at bera tykkum alt tað besta!

Ein serlig heilsan til mammu og babba, Anniku, Selmu og Sylviu á Eiði. Tað hevði verið allarbest at verið heima hjá tykkum; gingið ein túr oman á Møl av og á og notið jólafriðin, men so longi uppgávur skulu skrivast, er ringt at fina rættan frið, men lat okkum vóna tað lukkast mær at koma heim næstu jól. Í ár haldi eg jól saman við Lars og svigerfamiljuni, her hjá okkum á Østerbro, so tað verður uttan iva hugnaligt. Klikan sum í dag er spjadd í allar ættir, skal eisini hava eina heilsan: Svanna, Sunnuvá, Lydia, Maria, Beinta, Gunnhild, Marita, Óluvá, Helga, Eyðfríð, Vanja og Joan. Eg gleði meg at síggja tykkum allar aftur og hopi tit hugna tykkum sum best nú um jólini og njóta at hava frí í nakrar dagar. Tað verður spennandi at koma heim næstu ferð og fara runt at vitja - listin av nýggju húsum og børnum, sum eg ikki havi sæð enn veksur skjótt :o) Til Mirjam, Vanju og Joan: 1000 takk fyri gávurnar! Nú gleði meg til pakka upp í morgin :o) eg eri eisini orduliga spent eftir at vita, hvussu boyggin hjá Joan & Janus fer at eita! Til Eyðbjørg og Rúnu: eg vóni tit fáa ein hugnaligan dag í morgin saman við Jan og Boddanum og at alt tit hava brúk fyri liggur undir lítla jólatrænum : o) Bestu jólaheilsanirog klemm frá Amandu


Sun Investments S.L
Húsasøla frá Spanien
www.suninvestmentsl.com
Linda Ros · Tel 0034 646 930 757

Vegna 30 ára starvsdag verður latið 10% avsláttur av øllum vørum í allan desember mánað

30% verður latið av bílagdari katalogvøru

Opið er soleiðis
mán. - hós. . kl. 10.00 til 17.30
fríg. ........... kl. 11.00 - 18.00
leyg. .......... kl. 10.00-14.00

Gullhornið
v/ L.E.H.N
Bringsnøgøta 1 • Dandastova
FO-100 Tórshavn • Tel. 314430, heima 318361

MIÐFLOKKURIN
hvørt vikuskifti í Sosialinum
➤ Málsøkin
➤ Miðvísur
➤ Málrættaður
Miðflokkurin sjálvandi



Fríðtór Debes

## Profilurin

**Navn:** Fríðtór Debes
**Aldur:** 48 ár
**Starv:** Leiðari á Kunningarstovuni í Sandoynni og lærari
**Familjuviðurskifti:** Giftur við Ann Mari og eiga vit børnini Rakul, ið er 20 ár og Jósva, ið er 15 ára gamal

## Valevni til løgtingsvalið

Síðani mars mánaða 2007 havi eg arbeitt á Sandoynni sum kunningarleiðari fyri Sandoyar Kunningarstovu ,og eri eisini lærari við Sandoyar Meginskúla. So fyrrapart arbeiði eg í skúlanum, og seinnapart eri eg á Kunningarstovuni.

Eg brenni fyri, at Føroyum má gangast væl á allan hátt. At tað framhaldandi skal vera gott at búleikast á hesum klettum, ið Skaparin gav okkum.

Tað er av alstórum týdningi, at vinnan – á landi og sjógvi – hevur so góðar umstøður sum tilber.

Eitt, ið eg haldi føroyingar eiga at leggja seg meira eftir, enn í undanfarnum árum, er varandi orku. Vit hava nakrar av bestu møguleikum, tá hugsað verður um vind-, streym-, aldu-, sól- og vatnorku. Í einum alt meira altjóðagjørdum heimi – er tað av stórum týdningi, at vit hugsa um hesi tingini eisini.

Eitt annað, ið eg haldi, at nakað eigur at verða gjørt við – er at skatturin eigur at fara niður so líðandi til eitt hóskandi prosent tal – yvir eitt longri áramál. Tað skal altíð loysa seg væl og virðiliga at arbeiða í Føroyum.

Sandoyggin eigur at fáa ein undirsjóartunnil ongantíð ov skjótt. Hetta er bæði rætt og rímiligt – um oynni skal lív verða lagað.

Eg var við til at stovna Miðflokkin, tað tíð tað var. Eg var ein av teimum, ið metti, at brúk var fyri einum slíkum flokki í Føroyum. Ein flokkur, sum í sínari uppruna ideologi, bygdi á kristna grundarlagið og kristnu virðini, ið alt ov ofta eru vorðin misrøkt. Tíðin síðani Miðflokkurin varð stovnaður, hevur eisini víst at tað loysti seg – sjálvt um tað mangan hevur brotið í bæði borð. Mangan hevur flokkurin verið á breddanum, tí hann tordi, tá á stóð.

Visti tú at

- Innan ferðavinnuna, er okkara land er valt út, sum mest áhugaverda oyggjaland í heiminum – nr. 1 millum 111.
- At ferðavinnan/ upplivingarvinnan er ein skjótast veksandi vinna í heiminum og at vit eiga at gera nýtslu av hesum.

www.midflokkurin.fo